# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*–Veðurlagsbroytingarnar gera longu um seg kring allan heimin*
*(bretskur veðurgranskari)*

# Einsamallur um Atlantshavið

*Tann 14 ára gamli Michael Perham fekk frí frá skúlanum til at royna, um hann kundi sigla tvørtur um Atlantshavið einsamallur. Fyri seks vikum síðani legði hann frá landi í Gibraltar, og í gjár kom hann til Antigua hinumegin Atlantshavið. Michael Perham er tann yngsti, sum hevur siglt einsamallur á báti tvørtur um Atlantshavið.*



# 2007 kann gerast heitasta árið nakrantíð

**Bretskir veðurfrøðingar siga seg hava ábendingar um, at árið í ár kann gerast tað heitasta nakrantíð**

Á bretsku veðurstovuni, Met Office, vænta veðurfrøðingarnir, at í ár verður meðalhitin á Jørðini 0,54 stig oman fyri langtíðarmeðalhitan. Heldur hendan metingin, verður 2007 tað heitasta árið, síðani tær skipaðu hitamátingarnar byrjaðu fyri 150 árum síðani.

Bretsku veðurfrøðingarnir siga, at tað eru ymsar orsøkir til, at árið í ár kann gerast tað heitasta. Dálkingin ger sítt, men veðurfyribrigdið El Nino fær eisini sína ávirkan í ár. El Nino, sum er ein óvanliga heitur streymur í Kyrrahavinum, ger um seg við jøvnum millumbili og er virkin nú. Veðurfrøðingarnir hjá Met Office siga, at El Nino verður virkin nakað inn á hendan ársfjórðingin, men at hann fer at ávirka veðurlagið fleiri mánaðir aftaná.

Í 1998 fekk El Nino stóra ávirkan á veðurlagið víða um heimin og gjørdi millum annað, at tað árið var meðalhitin á Jørðini 0,52 stig oman fyri langtíðarmeðalhitan. Tað er met, men í ár verður munurin 0,54 stig samanbært bretsku veðurfrøðingunum.

Veðurgranskarin Katie Hopkins sigur við Reuters, at forsagnirnar hjá Met Office er enn ein ávaring um, at broytingar eru í veðurlagnum um allan heimin.



# Bush vil hava javnvág

**USA skal hava javnvág á fíggjarlógini innan 2012, sigur forsetin.**

Tey seinastu árini hevur USA havt ovurstórt hall á fíggjarlógini, men nú vónar George W. Bush, forseti, at fáa hjálp frá demokratiska meirilutanum í Kongressini til at fáa fíggjarlógina aftur á beint.

Aftan á ein stjórnarfund í gjár segði Bush, at ætlan hansara er at fáa javnvág á fíggjarlógina innan 2012. USA hevur havt ovurstórt hall ár um ár orsakað av útreiðslunum til kríggini í Irak og Afganistan og skattalættum, sum stjórnin og republikanararnir settu í verk fyri nøkrum árum síðani.

Men nú ætlar forsetin at skarva av hallinum. Hann ætlar at leggja eina langtíðarætlan, sum skal enda við javnvág um fimm ár. Hvørjar útreiðslur skulu lække, vil hann ikki siga, men talan verður um øðrvísi raðfestingar, sigur hann.

*Nú ætlar Bush at fáa javnvág á fíggjarlógina*

## STUTT SAGT

### Kanna skuldsetingar

ST fór í dag undir at kanna skuldsetingar um, at hermenn og starvsfólk hjá felagsskapinum hava gjørt seg sek í kynsligum ágangi ímóti børnum í Sudan. Tað var bretska blaðið Daily Telegraph, sum kom við skuldsetingunum, og sambært blaðnum hava minst 20 børn niður í 12 ára alur verið fyri ágangi. ST-talsmaðurin Michele Montas, segði í gjár, at ST hevur sera greiðar reglur á hesum øki. Vísir tað seg, at nakar er sekur, fær viðkomandi sekkin og verður harafturat revsaður.

### Stórt avlop

Tað gongur strúkandi hjá tí almenna Danmark. Hagtøl hjá Tjóðbankanum vísa, at á nýggjárinum átti staturin 92,8 mia. krónur á kontu í bankanum, og tað er 26 mia. krónur meiri, enn stjórnin væntaði í einari meting í síðsta mánað. Thor Pedersen, fíggjarmálaráðharri, sigur, at tann góða gongdin í búskapinum hevur givið størri inntøkur enn mett, samstundis sum tað almenna eisini hevur spart á dagpenga- og eftirlønarøkinum. Ráðharrin er ikki í iva um, at avlopið skal brúkast til at gjalda skuld hjá statinum.

### Stórur úlvur

Ein veiðimaður í Bulgaria hevur tryggjað sær pláss í metbókunum - ið hvussu er eina tíð. Fyrr í vikuni skeyt hann ein úlv nærhendis bygdini Brusartzi har norðuri í landinum. Tá hann og felagar hansara vigaðu úlvin, vísti vektin neyvt 80 kilo, og so tungur úlvur er ikki veiddur nakrastaðni fyrr. Tað gamla metið var 79,4 kilo, og tað var ein úlvur, sum bleiv skotin í amerikanska statinum Alaska í 1939.